## Eivør á Celtic Connection

Alt fleiri fólk leggja í hesum døgum merki til tað, ið føroyingar hava vita síðan 1999, Eivør hevur eina fantastiska songrødd. Í annað kvøld og kvøldið eftir fer hon annað ár á rað á pallin á risastóra Celtic Connection tiltakinum. Eivør spælir í annað kvøld saman við alternativa bluegrass bólkinum Crooked Still á Venue ABC og fríggjakvøldið er Eivør sjálv á The Royal Concert Hall í Glasgow. BBC plagar at senda frá tiltakinum og í fjør sóu fleiri milliónir bretar framførsluna hjá Eivør 3 ferð á stóru sjónvarsprásini.

## G! Festival og Intrum skriva undir sáttmála

G! Festival hevur fingið nýggjan samstarvsfelaga í Intrum. Hetta merkir at figgjarligu viðurskiftini vera betur skipaði frameftir. G!Festivalurin skrivar, at endamálið er at fáa munadyggari og smidligari skipan í samband við innheinting av útistandandi ogn. Hetta skuldi havt við sær, at meiri orka kann brúkast til kjarnuøkini hjá G!, meðan Intrum yvirtekur uppgávur innan síni kjarnuøki. Eisini Intrum gleðist um sáttmálan við tað, sum felagið kallar Føroya besta festival.

**fs**

# Drelnes aftur á garnaveiði



*Drelnes er aftur á garnaveiði, og manningin er hin sama, sum undan hendingini, tá ið skipið fór á land í Byrgishavn. Síðan 1. juni 2006 hevur daglønin umborð verið slakar 1696 krónur, og manningarparturin seinastu 7 mánaðirnar av 2006 tískil slakar 300.000 krónur*

**Garnaskipið Drelnes hjá Gudmundi Mortensen, sum fór á land á Trongisvágsfirði herfyri, er farin aftur til fiskiskap. Skipið er umvælt á Tórshavnar Skipasmiðju, og sum skilst, var skaðin ikki so umfatandi, sum menn stúrdu fyri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur gingið væl hjá garnaskipinum Drelnesi at fiska, síðan Gudmund Mortensen keypti skipið, ið er fyrrverandi Jónrit og Akraborg.

10 mans eru við skipinum, og skipari er Janus Sørensen.

Nú skipið loysti aftur týskvøldið, er manningin hin sama, sum var umborð vanlukku túrin, tá ið teir fóru av Tvøroyri og skuldu út at draga gørnini, men endaðu uppi á eystara armi á Byrgishavn.

Gudmundur Mortensen, reiðari, sigur, at skipið er umvælt á Tórshavnar Skipasmiðju, og at skaðin tíbetur ikki var so umfatandi, sum menn stúrdu fyri.

Sum skilst, kostar umvælingin nakrar hundrað túsund krónur, men aftrat hesum kemur so mista fiskitíðin.

### Góð inntøka

Tað var 1. juni í 2006, at Gudmundur Mortensen yvirtók Drelnes, sum tá kallaðist Jónrit og var heimahoyrandi á Strondum.

Síðan 1. juni í fjør hevur Drelnes gjørt 20 túrar á garnaveiði, og hetta tíðarskeiðið hevur manningarparturin verið slakar 300.000 krónur. Ella sagt á allan hátt hevur daglønin hjá teimum, sum hava verið við skipinum hesar 175 dagarnar, verið 1696 krónur.

Tað er ófør inntøka.

Daglønin umborð á Jónrit, sum skipið kallaðist fram til 1. juni 2006, var 1564 krónur.

Tølini siga okkum, at skipari og manning einki hava at skammast yvir, tá ið ræður um fiskiskap og inntøku.

# Eingin sjófrágreiðing verið enn

**Sýslumaðurin í Suðuroy, Sommer Joensen, váttar, at onkur av manningini umborð á Drelnesi hevði promillu í blóðinum, tá ið skipið fór á land herfyri**

DRELNES-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Blóðroyndir, sum løgreglan syrgdi fyri vórðu tiknar, tá ið Drelnes fór á land, vísa, at onkur av manningini hevði promillu í blóðinum. – Hetta gevur grundarlag fyri víðari kanningum, sigur Sommer Joensen, sýslumaður í Suðuroy*

Sýslumaðurin í Suðuroy, Sommer Joensen, sigur, at enn hevur eingin sjófrágreiðing verið í Drelnesmálinum, men hann váttar, at biðið er um sjófrágreiðing.

- Tað eru ávísir partar í einum slíkum máli, sum kunnu biðja dómaran um sjófrágreiðing, og í hesum førinum havi eg skilt, at reiðaríið og tryggingarfelagið eru samd um at biðja um sjófrágreiðing.

Sýslumaðurin veit ikki at siga, nær sjófrágreiðingin verður, men tað verður so í nærmastu framtíð.

- Verður sjófrágreiðingin her suðuri, setir dómaraskrivstovan seg í samband við okkum, men tað kann eisini verða, at frágreiðingin verður givin í Havn.

### ”Separat” mál

Sommer Joensen sigur, at arbeiðið, sum løgreglan ger, tá ið slíkt hendir, sum so einki hevur við sjálva sjófrágreiðingina at gera, men tað tilfar, sum løgreglan hevur í málinum, verður lagt við málinum.

- Vit gera okkara kanningar, men tað, sum vit gera og tað, sum sjórætturin kann gera, koyrir ”separat”, sum sýslumaðurin tekur til.

Hann vísir á, at tað í seinasta enda er Skipaeftirlitið sum avger, um reglur eru brotnar, og um nakar skal ábyrgdast eftir sjólógini. Er løgreglufrágreiðing í málinum, verður hon sum nevnt løgd við.

- Tað henda nógvir smærri og størri skaðar í skipavinnuni millum ár og dag. Tað er ymiskt, hvussu hesi málini verða avgreidd, og tað eru eisini mál, sum verða avgreidd – uttan, at biðið verður um sjófrágreiðing, sigur sýslumaðurin.

### Promilla

Sommer Joensen váttar yvirfyri Sosialinum, at blóðroyndir, sum løgreglan syrgdi fyri vórðu tiknar, eftir at Drelnes var farin á land, vísa, at onkur av manningini hevði promillu í blóðinum.

Sýslumaðurin vil tó ikki siga meira um ítøkiliga málið, men leggur aftrat, at royndirnar vísa, at grundarlag er fyri víðari kanningum av hesum málinum.